gult12 cyan12 magenta12 svart12



Kommunuvalið á Eiði, fjórði partur:

# Landsstýrið arbeiðir eftir ivasamari heimild

**Okkurt óregluligt fór fram í sambandi við kommunuvalið á Eiði seinasta heyst. M. a. var ikki samsvar ímillum talið á eiðisfólki, sum høvdu verið á valið, og talið á atkvøðuseðlum í atkvøðukassanum, tá valið var endaliga uppgjørt**





Tá aktøvðurnar til bygdarráðsvalið á Eiði vórðu fíntaldar, var ein atkvøða var meira í atkvøðukassanum enn talið á eiðisfólki, sum høvdu valt. Hetta fekk tveir eiðismenn at kæra valið til bygdarráðið. Eftir at bygdarráðið hevði burturvíst kæruni við teprum meiriluta, var málið kært til Føroya Landsstýrið

KOMMUNUVAL
*Jóanes N. Dalsgaard*

Ein atkvøða var meira í atkvøðukassanum enn talið á eiðisfólki, sum høvdu valt, og fekk hetta tveir eiðismenn at kæra valið til bygdarráðið. Eftir at bygdarráðið hevði burturvíst kæruni við teprum meiriluta, var málið kært til Føroya Landsstýrið.

Tá eitt mál verður lagt fyri ein fyrisitingarligan myndugleika, skal myndugleikin fyrst av øllum kanna eftir, at myndugleikin hevur heimild til at viðgera málið, og um so er, hvussu langt hendan heimild røkkur. Landsstýrið er ein fyrisitingarligur myndugleiki – tann ovasti í Føroyum – og skal landsstýrið tí eins og allir aðrir fyrisitingarligir myndugleikar støðugt hava heimild til sítt virksemi.

### Ivasama heimildin

Avgerðin hjá Eiðis bygdarráð um at burturvísa kæruni um kommunuvalið, varð kærd til landsstýrið við tilvísing til §24, stk. 3 í kommunuvallógini . Sambært hesi grein skal kommunustýrislimur sleppa úr bygdaráðnum, um hann vegna ringa heilsu, starv ella virki sítt ella tílíkt hevur góða grund til tess. Í lógargreinini stendur einki um kærur, sum hava við sjálvt valið at gera. Eingin heimild er heldur í hesi lógargrein til landsstýrið at viðgera kærur um kommunuval.

Kommunuvallógin inniheldur heimildir til landsstýrið at viðgera kærur í sambandi við kommunuval. Ein tílík heimild er at finna í §24, stk. 4. Her verður landsstýrismanninum heimilað at viðgera kærur um avgerðir, sum bygdaráðið hevur tikið viðvíkjandi umsóknum um at sleppa undan vali og áheitanum um at sleppa úr bygdaráðnum. Men heldur ikki her er nøkur heimild til landsstýrið at viðgera kærur um sjálvt valið.

Sambært Løgmansskrivstovuni er málið viðgjørt við heimild í tí danska tekstinum í kommunuvallógini §24, stk. 3. Trupulleikin við hesum er tó, at tann danski teksturin í kommunuvallógini varð ógildaður við lóg 6. oktober 2000 . Tann danski teksturin var sostatt ikki galdandi lóg í Føroyum longur, tá kæran hin 15. desember 2000 var send landsstýrinum. Kortini nýtir landsstýrið danska tekstin sum heimild. Tað minsta, sum sigast kann um hesa mannagongd er, at hon er óvanlig.

### Greiða heimildin

Landsstýrið hevur heimild til at viðgera kærur um kommunalar myndugleikar, og soleiðis eisini eina kæru um Eiðis bygdarráð. Hendan heimild finst í kommunustýrislógini. Men heimildin er ikki óavmarkað. Sambært § 48 í kommunustýrislógini skal landsstýrismaðurin í kommunumálum hava eftirlit við kommununum. Hetta merkir m.a. at landsstýrismaðurin skal góðkenna ávísar avgerðir, sum kommunustýri taka. Hendan heimild ber í sær, at ein kommunal avgerð kann vera ógildug um so er, at hon ikki er góðkend av landstýrismanninum.

Ein onnur heimild er í § 55 í kommunustýrislógini. Sambært hesi grein kann landsstýrismaðurin í kommunumálum ógilda eina avgerð hjá bygdarráðnum, um avgerðin er ólóglig. Fyri at kunna ógilda eina avgerð, við heimild í § 55 skal fyrst av øllum staðfestast, um avgerðin er ólóglig. Í summum førum er einki at ivast í, og tá kann landsstýrismaðurin taka avgerðina sjálvur. Í øðrum førum kann tað vera trupult at staðfesta um ein avgerð er ólóglig ella ikki. Í tílíkum førum er vanligt um okkara leiðir at leggja spurningin fyri rættin. Kemur rætturin til ta niðurstøðu, at avgerðin er ólóglig, so hevur landsstýrismaðurin heimild sambært § 55 at ógildað avgerðina.

### Landsstýrið valdi ivasemið framum rættin

Hvat hevði landsstýrið so heimild til at gera við kæruna frá Eiðismonnunum báðum?

Sum sæst omanfyri, so hevur landsstýrið onga heimild til at meta um uppgerðina av einum kommunuvali.

Tað, sum landsstýrið hevur heimild til í hesum málinum er at meta um, hvørt avgerðin hjá Eiðis bygdarráð, um at burturvísa kæruni frá Eiðismonnunum báðum, var lóglig ella ikki. Talan er um eina fyrisitingarliga avgerð, og hendan má ikki vera ávirka av, um bygdarráðslimirnir eru nøgdir við valúrslitið ella ikki. Er avgerðin ávirka av politiskum og/ella persónligum fyrilitum, so er talan um valdsbendan, sum merkir at avgerðin er ólóglig.

Henda spurning kundi landsstýrið latið rættin tikið støðu til. Landsstýrið kundi so avgjørt kæruna um Eiðis bygdarráð, við støði í einum rættarúrskurði. Men landsstýrið nýtti ikki henda møguleikan. Í staðin valdi landsstýrið at avgerða málið við sera ivasamari heimild.

# Sløkkibilurin, gramma kaninin og Kurt og fiskurin

**Bókadeildin hjá Føroya Lærarafelag hevur givið út tríggjar bøkur, »Sløkkibilurin« eftir Alex Wilson, »Tann gramma kaninin og aðrar søgur« eftir Enic Blyton og »Kurt og fiskurin« eftir Erlend Loe.**



Bókin um sløkkibilin er formað sum ein sløkkilbilur, hon er 12 síður, sum eru úr hørðum, haldgóðum tilfari




Nógvar av søgunum í bókini »Tann gramma kaninin« hava verið at hoyrt í Barnaútvarpinum. Bókin er 188 síður, og Alex Sólstein týddi úr enskum




Juli Fagerland hevur týtt skemtiligu bókina um »Kurt og fiskin«

BÓKAÚTGÁVA
*Eirikur Lindenskov*

»Sløkkibilurin« er stór, sniðskorin bók um ein sløkkibil og sløkkiliðsfólkini, Magnu, Tummas, Birnu og Biksbinu. Magna hevur føðingardag, og føðingardagsútferðin saman við vinunum verður meira spennandi enn gávurnar. Hugtakandi bók, sum tú kanst hyggja leingi at saman við barninum og støðugt varnast nýggjar smálutir og ymsar søgugongdir.

Bókin er 12 síður í litum, prentað á haldgott papp. Hon kostar 75 krónur í bókhandlunum. Hestprent hevur prenttilgørt.

Bókina »Tann gramma kaninin og aðrar søgur« hevu rein hin kendasti barnabókaritøhvundurin í Onglandi, Enic Blyton, skrivað. Fleiri ættarligð hava lisið barnabókarøðir hennara, t. d. bøkurnar um »De fem«, sum ein eitur á donskum. Eisini er hon kend fyri smásøgur sínar. Í hesi bókini er eitt úrval av smásøgum, 15 í tali. Søgurnar eru sera væl egnaðar at lesa upp fyri børnum. Nevnast kunnu t. d. »Halin á Stubba«, »Tá ið kavamaðurin fór at skelva«, »Seyðadrongurin og vættrarnar«, »Gramma kaninin og Tríðhjólaði hesturin«. Nógvar av søgunum hava verið at hoyrt í Barnaútvarpinum í vetur. Alex Sólstein týddi søgurnar úr enskum.

Bókin er prýdd við nógvum svørt/hvítum myndum, sum Rene Cloke og Brian Hoskin hava teknað. »Tann gramma kaninin« er 188 síður, innbundin og kostar 115 krónur. Bókin er umbrotin og prentað á Hestprent.

»Kurt og fiskurin« snýr seg, sum vera man, um Kurt. Hann koyrir trukk, og tað hevur hann gjørt í nógv ár. Næstan heilt síðani hann var lítil. Fyrst gekk Kurt í skúla, soleiðis sum øll børn gera. Tað dámdi honum illa, men tá ið hann ikki var noyddur at ganga í skúla longur, fekk hann sær ein trukk og fór at koyra. Hvønn dag koyrir Kurt trukk niðri á keeini. Hann lyftir tungar kassar, sum koma við skipum uttan úr heimi.

Kurt hevur yvirskegg. Og so eigur hann eina konu. Anna Lisa, sum er framúrskarandi og fitt, og hon er arkitektur. Kurt og Anna Lisa eiga trý børn. Ein dagin finnur Kurt okkurt niðri á keiini. Hann finnur nakað, sum hann ongantíð hevur sætt fyrr. Okkurt liggur har, og tað, sum liggur har, er stórt og svart… Juli Fagerland týddi skemtiligu bókina um Kurt og fiskin.

Bókin er prýdd við nógvum svørt/hvítum myndum, sum Kim Hoithøy hevur teknað.

»Kurt og fiskurin« er 92 síður og kostar 90 krónur. Bókin er umbrotin og prentað á Hestprent.

gult13 cyan13 magenta13 svart13

ítróttur

Nr. 124 • týsdagur • 3. juli 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

# Málið er at røkka teimum 100

**Nú farið verður til Oyggjaleikir hevur Marjun Kalsø leikt 85 landsdystir á føroyska kvinnulandsliðnum í flogbólti, og hóast hon ikki er nakar ársungi longur, so hevur hon hug at halda á, til hon hevur rokkið hundrað landsdystir**

FLOGBÓLTUR

Leygardagin verða Oyggjaleikirnir á Isle of Man settir og sum ikki einaferð eru føroysku flogbóltskvinnurnar við. Málið hjá teimum er at verja gullið, sum tær — eitt sindur óvæntað — vunnu á Gotlandi, og saman um tikið má sigast, at liðið skuldi verið ført fyri tí. Hetta kvinnulandsliðið er helst tað sterkasta nakrantíð. Kortini ber ikki til at siga nakað frammanundan tí eingin veit, hvussu mótstøðuliðini eru fyri.

### Hugurin er drívmegin

Tá hugt verður eftir, hvørjir leikarar eru á føroyska kvinnulandsliðnum í flogbólti, sæst, at tað er ein góður blandingur av leikarum, sum spæla í heimligu kappingini og teimum, sum spæla uttanlands. Harumframt er tað eisini ein góður blandingur av yngri og eldri, meira royndum leikarum.

Tað er uppi í hesum seinasta bólkinum vit finna Marjuna Kalsø. Við sínum 38 árum er hon nógv tann royndasti leikarin á føroyska kvinnulandsliðnum og tann sum ivast, kann bara kaga eftir, hvussu nógvar landsdystir hon hevur leikt.

Higartil eru teir 85 í tali og tá Oyggjaleikirnir eru av, eru teir helst vorðnir 90. Og tá hugt verður at aldri og dystartali í senn, so kundi hugsast, at Marjun hevur fingið nóg mikið av flogbólti. Men so er ikki.

- Eg havi onkuntíð sagt at nú átti eg at lagt frá mær, men eg havi kortini hildið fram, og nú eg eri so nær við teir hundrað dystirnar, so kann eg eins væl halda á, til eg eri komin har til, sigur Marjun Kalsø, sum kortini leggur afturat, at tað sjálvandi er tengt at, um venjararnir halda at hon er nóg góð til landsliðið.

### Góð blanding

Ein onnur orsøk til, at Marjun heldur á er, at hetta landsliðið er sera væl mannað, og tí heldur hon at tað hevði verið spell ikki at fingið henda túrin við eisini.

- Liðið er væl blandað við leikarum heimanífrá og føroyingum uttanlands og tað ger tað sera spennandi at vera við. Harumframt hava vit eitt sera gott samanhald á liðnum og tað ger sítt til, at vit arbeiða væl saman sum eitt lið. Tí vil eg fegin uppliva tað eisini, sigur Marjun.

Oyggjaleikirnir, sum nú standa fyri durum, eru teir níggjundu í røðini, men eru teir sjeyndu, sum íðkandi, hjá Marjun. Hon var ikki við í teimum fyrstu í 1985, tí hon fekk ikki frí frá arbeiðsplássi sínum, og hon var ikki við á Álandi í 1991, tí hon júst hevði átt. — Eg varð biðin um at koma við, men eg orkaði ikki, greiðir Marjun frá.

Spurd, hvørjar vónir hon hevur til hesa kappingina, sigur hon, at tað liggur eitt rættiliga stórt trýst á liðnum, tí tað vann gull seinast.

- Hóast vit ikki vita, hvussu hini londini hava ment seg, so vita vit, at okkara lið hesaferð er minst líka gott sum tað, sum vann seinast. Gamaní eru fleiri leikarar skiftir út, men í flestu førum er talan um eldri leikarar, sum eru givnir og yngri, sum eru komnir ístaðin. Tað gevur nakað at byggja á frameftir, og tí hava vit gott í væntu framyvir, sigur Marjun.

### Hava fleiri royndir

Hon leggur afturat, at tað eisini hevur sera stóran týdning fyri liðið, at útlagdu føroyingarnir nú hava leikt tvey ár afturat í útlendskari kapping, og tí eru tær enn meira royndar enn tær vóru fyri tveimum árum síðani.

- Hatta er galdandi bæði fyri Alvildu, Hjørdis og Gudrid, sum framvegis hoyra til yngra ættarliðið av føroysku landsliðsleikarunum, tí tær skulu skapa tyngdina í føroyska spælinum.

Sum sagt er Marjun helst tann royndasti føroyski flogbóltsspælarin yvirhøvur í løtuni, og hóst hon ikki longur hoyrir til í yngra endanum, so kennir hon seg ikki uttanfyri av teirri orsøk.

- Ein orsøk til at eg tími at halda fram — og tað er bæði galdandi fyri Mjølnir og landsliðið — er, at samanhaldið millum leikararnar er einastandandi gott. Einki lið stendur uppi av einstaklingum. Uttan samanhald ber ikki til at hava eitt gott lið. Soleiðis kenni eg tað við hesum landsliðnum og tá til stykkis kemur, kann tað fara at vera tann avgerðandi parturin. Vit kunnu siga alt hvør við aðra og tað er neyðugt viðhvørt, sigur Marjun, sum fyrstu ferð fór at spæla flogbólt tá hon var 16 ára gomul.

Tá hevði hon roynt seg við badminton og hondbólti, men tað skuldi gerast flogbólturin, sum gjørdist hennara vørumerkið. Og uttan nærri kanning kunnu vit ósmæðin staðfesta at eingin kemur nærhendis dystartalinum hjá Marjun í bræði, sjálvt um hon fyrr hevur hótt við at gevast. Men nú nærkast teir hundrað dystirnir og so kann hon eins væl halda á.



*Vit kunnu siga alt hvør við aðra og tað er neyðugt viðhvørt, sigur Marjun Kalsø millum annað um tilveruna á flogbóltslandsliðinum*

# Rósur til Rógva

**Føroyski súkklarin stóð seg væl um vikuskiftið, tá hann kappaðist móti nøkrum av sterkastu súkklarunum í Danmark**

SÚKKLING
*Jákup Mørk*

Fríggjdagin varð kappast um DM í einkultstari, og millum luttakararnar var føroyski súkklarin, Rógvi Johansen.

Tá alt kom til stykkis, hevði Rógvi vunnið sær eitt 15. pláss, og millum annað hevur Jyllands Posten í Århus nøkur sera rósandi orð til Rógva eftir avrikið.

Ikki minst tí Rógvi eisini hevði trupulleikar av kervinum á súkklu, men hóast hetta veruliga megnaði at leggja trýst á navnframu mótstøðumenninar.

Umframt at fáa stig til danska ratinglistan, fekk Rógvi eisini, sum fyrsti føroyingurin, stig til altjóða ratinglistan fyri súkklarar. Ei undur í, at Rógvi sjálvur er errin um hetta.

*Líkt er til, at sterkasti súkklari okkara veruliga hevur rakt toppformin, nú tað stundar til oyggjaleikir*

